**GUITARI TIL SØLU**
Ein Ibanez, lítið brúktur, og er í góðum standi. Nýprísur 4.500,- til sølu fyri 2000 kr.
Tlf. 317354 eftir kl. 18, Uni

**KOMPLET BILANLEGG**
Pioneer radio/fløguspælari, Pioneer forsterkari 70 w x 2, Pioneer equalizer og eitt par av super Sony hátalarum 3000,- kr.
Tlf. 318700 ella 243224

## Út- & Sjónvarp

**BILANLEGG**
Eitt gott Clarion DRX 6575 Rz til sølu. CD + radio v/4 x 14 watt (rms 1%) forsterkara. 1 ára garanti. Selist fyri ca. 2.500.
Ring 319969
ella 23344627, Høgni

**FORSTERKARI**
Ein Soundstream Rubicon 405 (5/3 kanalir) til sølu fyri 3.500,- Hevur 4 x 50 + 1 x 150 w ella 2 x 100 + 1 150 watt.
Tlf. 319969
ella 23344627, Høgni

**PARABOL TIL SØLU**
vegna flyting (Finlux) við tveimum skálum, 2 digital høvd + 2 x 15 m. leidningur, alt fyri 5.000 kr.
Tlf. 333955

**SJÓNVARP TIL SØLU**
20" Philips sjónvarp til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 319795

## Ymiskt

**ALTANHURÐ**
Eik v/ rúti, karmmát: 95 x 212, bíliga til sølu.
Tlf. 282116

**ÁRLIGI MARKNAÐARDAGURIN**
í Sjónleikarhúsinum verður 1. april. Hava tygum eitthvørt at lata taka við fegin ímóti 18. og 25. mars kl. 13-16. Eisini kunnu vit heinta ting.
Ring 311132 ella 217510

**BASARUR Í KVÍVÍK**
7. mai fara vit aftur at hava basar. Tí heita vit á tykkum, um at hugsa um okkum. Vit vóna, at undirtøkan verður eins góð sum seinast. K.S.R.
Glæman, Skótarnir

**BORÐTENNIS**
eitt vælhildi borðtennis borð ynskist til keyps. Skal hava hjul undir.
Tlf. 314268

**BRENNIOVNUR**
Óbrúktur brenniovnur til sølu. b. x h. x d: 60 x 45 x 55 + fótur.
Tlf. 310436 eftir kl. 17.30

**EFTIRLÝSING!**
Er tað nakar ið eigur uml. 30 fermatrar av loftklædningi at selja mær.
Tlf. 317139

**EIN MOTOROLA**
Micro Tac PRO NMT 900, við tasku, eykabattarí, ristara, bil- og inniløðara, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 449045
ella 283753

**EIN TRØÐ**
í Miðvági til sølu fyri 210.000 kr. ella um hægri boð fæst.
Bill.mrk.036790

**EITT**
Nintendo 64 tv-spæl við øllum til sølu.
Tlf. 456757

**FARTELEFON TIL SØLU**
Ein Ericsson GF-768 GSM fartelefon við tasku og ladara. Lítið brúkt.
Tlf. 320525
eftir kl. 18.30

**FERÐ FYRI TVEY**
Vel millum Athen, Evia, London, Nice, Paris, Venedig, til sølu við stórum avslættri.
Tlf. 311105

**FORSTØRRILSISTÓL**
til framkalling av myndum ynskist.
Tlf. 441680

**FRÁ STRÁLUNI**
Vit sóknast eftir tveimum kvinnum at rógva við Stráluni.
Tlf. 447239
ella 442198

**GSM**
telefon, Nokia 8810.
Tlf. 219293

**GSM FARTELEFON**
bíliga til sølu. Ein Siemens C-25 fartelefon við dualband, 100 tímar standby, 5 tímar talutíð. Vekt: 30 gr. mát: 116 x 46 x 28. Nýprísur: 1.890,- tín prísur: 1.300.
Tlf. 312602

**GSM FARTELEFON**
Ein Simens C25 við ladara til sølu fyri 1.300 kr. Bert 2 mðr. gomul.
Tlf. 221038

**HANDTØK**
12 bronsulitaði »antiklook« handtøk til skuffur ella skápshurðar til sølu. Prísuppskot 200 kr.
Tlf. 315474
eftir kl. 16

**KAPPRÓÐUR 2000**
Áttamannafarið „Skúgvur" kann lánast áhugaum felag til kappróður fyri árið 2000. Treytir v.m. ring
tlf. 212422

**SKÁPSHURÐAR TIL KØK**
Ca. 25 skápshurðar »gammel eg«, hill til eimhettu og listar, fýra undirskáp, eitt nýtt skáp við stálvaski og bakka, bíliga til sølu.
Tlf. 313456

**TECHNISC SB-T40**
Driftseffekt: 3,2 W, impedans 8* klemmer. Vedv. belastn. 60 W Mus. Belastn. 90W. Frek.: 40-35.000 Hz, 48L, 3-vejs, Bas 22 cm. Mellemt. 5,2 cm. Diskant 2,8 cm. h x b x d: 83 x 28,5 x 25,5 cm. 13,5 kg. Pris: 2.000 kr.
Tlf. 448506

**TRAPPA YNSKIST TIL KEYPS**
Eiga tit eina trappu at selja mær? Um so er, ring
tlf. 315152,
best aftaná kl. 18

**ÚTHURÐ**
ynskist til keyps. Karm mát 90 x 200 cm.
Tlf. 316299

**ÚTHURÐ YNSKIST TIL KEYPS**
Eiga tit eina úthurð at selja mær? Um so er,
ring tlf. 315152,
best aftaná kl. 18

**VINDEYGA YNSKIST**
Hevur nakar eitt vindeyga at selja mær, helst eitt husmorvindeyga.
Tlf. 373194

**VINDEYGU**
Nøkur góð vindeygu, dup. glas, ymiskar støddir. Verða seld bíliga.
Tlf. 282116

# Minningarorð um Poul Martin Joensen



Tann 23. januar andaðist Poul Martin Joensen 79 ára gamal. Ikki tí, bert fyri tveimum árum síðani var hann fermur sum ein unglingi, og lættur á føti. Men tá fekk hann ringa sjúku, og tað gekk bara tann eina vegin. Sum hann sjálvur segði: Nú gekk tað heimeftir.

Hann var mittastur av trimum brøðrum. Sigurd, tann eldsti fór fyri fáum árum síðani, og nú Poul Martin. Hjalmar er enn virkin sum góðskumetari, hóast hann er farin um pensjónsaldur.

Hanna og Poul Martin fingu 5 børn: Arnhold á Oyri, Hilmar á Skála, Malena í Danmark, Elibert í Fuglafirði og Erling, sum býr í Canada. Hesi eru øll væl undankomin og hava givið honum abba- og langabbabørn, sum nú vóru hansara gleði.

Poul Martin var sjómaður í ungum árum, og tá íð hann legðist uppi, varð hann vrakari og vrakieftirlitsmaður. Men hann var virkin á so mongum økjum. Hann var røktingarmaður, átti seyð sjálvur, og sporini vóru sum sagt løtt til fyri stuttum.

Íðin kirkjumaður var hann og deknur í eini 25 ár. Nærlagdur og altíð væl fyrireikaður. Eisini var hann trúgvur missiónsmaður.Hann livdi og andaði fyri missiónshúsinum; fyrireikaði tiltøk og helt andaktir. Hann legði nógva orku í, tá ið Thabor varð víðkað og umbygt til tað rúmliga og prýðiliga hús, tað nú er. Hóast Poul Martin ikki hevði bókliga útbúgving, var hann ein belisin og vitandi maður og hevði léttan penn.Tað vitna allar greinarnar, hann sendi "Trúboðanum", um. Eisini hevði hann aktuellar greinar í bløðunum og luttók millum annað í eini størri ritgerðarkapping um torvskúrð, sum fróðskaparsetrið skipaði fyri.

Eg hevði ta gleði at hava Poul Martin millum kvøldskúlanæmingarnar í fleiri ár saman við Linu Johannesen, Kristinu Toftegaard og Theodor Johannesen, sum øll eru farin í Harrans hendur og so mong onnur. Klók og upplýst fólk. Meðan hendurnar livdu kvikliga, gekk prátið, ofta á høgum, nærmast filosofiskum støði. Ríkar løtur at minnast.

Poul Martin var hugsjónarmaður og var drívmegin, tá íð Keypsamtøkan í Fuglafirði var stovnað, og hann sat sum nevndarformaður har í mong ár og var eisini nevndarlimur og formaður í Føroya Keypsamtøku eitt skifti. Hann sat eisini í Sjúkrakassanum í Fuglafirði og nevndarlimur í meginfelagnum.

Alt sítt lív var Poul Martin sannførdur Javnaðarmaður, og tað dulgdi hann ikki fyri. Hann visti at siga frá teirri tíðini, tá ið tað kundi kostað starvið ella tjansin, vart tú limur í Javnaðarflokkinum. Tí var hann eisini við til at stovna Eysturoyar Javnaðarfelag. Hann var eitt prýði fyri flokkin og ein fyrimynd. Tú føldi teg á rættari leið, vart tú samdur við Poul Martin. Hann var ein moralskur stuðul. Seinastu ferð hann var millum partamenn, var á landsfundi fyri hálvum øðrum ári síðani. Tá høvðu Poul Martin og Thorkil Beder leitað sær til Havnar, har teir fingu eitt hugnaligt prát við statsministaran Poul Nyrup Rasmussen.

Men fyrst og fremst var hann tann góði familjufaðirin, tann góði bygdarmaðurin og tann góði føroyingurin. Reiðiligur og heiðurligur. Poul Martin, sum øll høvdu virðing fyri og vóru góð við.

Tann óvanliga stóri skari til jarðarferðina við syrgjandi og samhugaðum úr øllum landinum vitnaði um ein høgt virdan mann, ið var borin til hvíldar.

Í samhuga við Honnu, børnunum og øllum hansara lýsa vit frið og signing yvir minnið um Poul Martin Joensen.

**Dan R. Petersen**


# Marknaðar-/søluleiðari

Fyri eina fyritøku á Skálafjørðinum søkja vit eftir dugnaligum fólki til at taka sær av marknaðarføringini. Fyritøkan er ein størri handilsfyritøka, sum selur og veitir tænastur til fyritøkur og persónar í øllum landinum.

Starvið, ið er sera fjølbroytt, fevnir í høvuðsheitum um fylgjandi arbeiðsuppgávur:

**Marknaðarføring**
- at skipa marknaðarføringina hjá fyritøkuni
- at tilrættisleggja lýsingarátøk
- at standa fyri gerð av sølufremjandi tilfari so sum faldarum og lýsingum

**Søluarbeiði**
- at aktivt seta seg í samband við møguligar kundar bæði skrivliga og við kundavitjanum
- at hava samskifti við kundar, sum venda sær til fyritøkuna
- at veita verandi kundum eina góða ráðgeving og tænastu

Vit leita eftir einum persóni, við góðari handilsligari útbúgving serliga við atliti at marknaðarføring, sameint við gott hugflog, ágrýtni og arbeiðssemi. Tað krevst, at tú dugir og dámar væl at arbeiða sjálvstøðugt og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum. Á tí tekniska økinum vænta vit at tú hevur hollan telduførleika, og at tú dugir at nýta tey mest vanligu telduforritini.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Umsóknir verða sendar skjótast gjørligt, og í seinast lagi fríggjadagin 31. mars 2000 til:
Virkisráðgeving Spf. Boks 26, 600 Saltangará. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Virkisráðgeving Sp/f, tlf. 44 95 91 og tosa við Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Virkisráðgeving Spf
**Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir**
Heimasíða: http://www.konsult.fo




nøvn nú

## Heilsanir



***Hey okkara elskaði babba og maður***
Ja, nú er gott at fáa teg heim aftaná at tú hevur veri› 3 mána›ar umbor› á »Kathrine Sif«. Hjartaliga, hjartaliga vælkomin heimaftur. Ta› er ordiliga »well« at hava teg aftur ímillum okkum.
***Heilsan børnini og konan***



***Góði mammubeiggi og ommubeiggi***
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á tínum fø›ingardegi tann 14.3.
***Kærastu heilsanir frá okkum øllum, Hákun og Jón***



***Góði fitti Jón***
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára fø›ingardegnum 13.3. Takk fyri títt fitta smíl.
***Ynskir mostir***



***Elskaði Jón***
Vit øll í húsinum ynskja tær hjartaliga tillukku á tínum 1 ára fø›ingardegi, i› var 13.3.
***Vit elska teg, Hákun***



***Góði Jón og Haldur***
Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku á 1 ára fø›ingardegn um 13.3. og 56 ára degnum 14.3.
***Kærastu heilsanir frá okkum øllum, Mathias og Karl***



***Elskaða Súsanna***
Hjartaliga tillukku vi› 11 ára degnum. Altí› ert tú líka røsk. Vit elska teg.
***Mamma, babba og Kiki***



***Góða Susanna***
Hjartaliga tillukku vi› 20 ára degnum 14.3. Alt gott framyvir
***ynskja vit 2 á Argjaboðagøtu 12***



***Góða Angela***
Hjartaliga tillukku vi› 9 ára fø›ingardegnum 15. mars. Jesus pápi signi framtí› tína.
***Allarbestu heilsanir frá mammu og babba***



***Góða Angela***
Hjartaliga tillukku vi› 9 ára fø›ingardegnum 15. mars. Vit gle›a okkum til fø›ingardagin.
***Allarbestu heilsanir, Sólvá og Heidi***



***Góða Kjarta***
Hjartaliga tillukku vi› 20 ára degnum sum var 7.2. Betur seint enn onganttí›. Vaska nú.
***Ynskja S. og P.***



***Góða kera, fitta, søta Torgunn***
Hjartaliga tillukku vi› 17 ára degnum tann 12.3. Hopi tú hev›i ein gó›an dag.
***Muss og klemm, heilsan A***



***Góða Barbara***
Hjartaliga tillukku vi› 8 ára degnum.
***Ynskir besta vinkona tín Gurið***



***Góði elskaði Jón***
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára fø›ingardegnum 13.3. Jesus pápi signi framtí› tína.
***Ynskja mamma og babba***



***Góða Hanna***
Tillukku vi› 19 ára degnum. Minnist tú hendan gó›a dagin í Legoland,
***Ynskja mamma, pápi og Krista***



***Góða Gerda***
Hjartaliga tillukku vi› fø›ingardegnum i› var 13. mars. Jesus pápi signi framtí› tína.
***Ynskja omma og abbi***



***Góði elskaði Jón***
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára fø›ingardegnum 13.3. Her eru tit fittir, tú og systkinabarni› Karl. Vit elska teg.
***Bestu heilsanir frá ommu, abba, mostir og mammubeiggja***

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** 25,- kr.

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ..........................................................
Bústaður: ..........................................................
Bygd/býur: .......................... Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«